Búskapur og vinna:
## 736 fiskifør høggast upp

Danskir fiskimenn vóru ikki serliga fegnir, tá ES-kommiserurin í fiskivinnumálum, týskarin Franz Fischler, undir einari vitjan í Keypmannahavn í vikuni segði, at veiðiorkan hjá danska fiskiflotanum skal skerjast 30 prosent. Hetta skal gerast sum liður í ætlaði skerjingunum í ES-fiskivinnuni, segði kommiserurin. Samstundis kom fram, at sambært tí fíggjarliga upplegginum, sum ES-nevndin arbeiðir við, skulu 736 donsk fiskifør høggjast upp tey fýra árini.

Stjórin í Danmarks Fiskeriforening, Niels Wichmann, sigur hetta vera heilt burturvið. Hann vísir á, at skal danska veiðiorkan skerjast 30 prosent, fer tað at bera í sær, at tann parturin av danska flotanum, sum fiskar til matna, hvørvur. Niels Wichmann sigur, at ein tílíkan niðurskurð kunnu danir ikki góðtaka, og hann kennir seg vísan í, at niðurskurðurin verður mundandi minni, tá saman um kemur.

## Seldu meiri laks og síl

Norska alivinnan útflutti í síðsta mánað laks og síl fyri 985 mió. norskar krónur. Tað var 46 mió. krónur meiri enn í sama mánað í fjør, og fyri fyrstu ferð í ár var útflutningurin í mai størri enn í sama mánað í 2001.

Teir fyrstu fimm mánaðarnar í ár hava norðmenn útflutt fiskavørur fyri 11,8 mia. norskar krónur. Tað er 1,3 mia. krónur minni enn í sama tíðarskeiði í fjør, og kemst afturgongdin av verri laksaprísi. Higartil hava norðmenn útflutt 140.000 tons av laksi í ár, og tað er 5.000 tons meiri enn fimm teir fyrstu mánaðarnar í 2001.

## Evran avhildin

Alt fleiri danir taka undir við evruni. Ein nýggj kanning vísir, at 58,7 prosent av teimum spurdu høvdu sagt ja, var fólkaatkvøða nú um at seta evruna í gildi ístaðin fyri krónuna. Bara 35 prosent høvdu atkvøtt nei.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Bush viðgekk mistøk og brek



*FBI-agenturin Coleen Rowley greiðir her Kongressini frá brævinum, sum hon sendi stjóra sínum Robert Mueller. Í brævinum fanst hon hvassliga at leiðsluni í FBI*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanska stjórnin skal hava eina nýggja ráðstovu, sum skal umsita landsins trygd**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Amerikanski forsetin, George W. Bush, viðgekk í einari sjónvarpsrøðu gjáranáttina, at landsins fregnartænastur skiltu ikki illgrunan og heldur ikki ávaringarnar undan tí, sum hendi tann 11. september í fjør. Forsetin segði kortini, at út frá teimum upplýsingum, sum hann hevur sæð, heldur hann ikki, at myndugleikarnir kundu havt fyribyrgt tí, sum hendi.

- Men nú vita vit, at túsundtals væl vandir drápsmenn fyrireika seg til at leypa á okkum. Hesin ræðuligi veruleikin noyðir okkum at fara øðrvísi fram enn higartil, segði forsetin í røðuni.

Ein hoyring í Kongressini hevur seinastu dagarnar avdúkað, at samveldisløgreglan FBI var ávarað um, at okkurt kanska var á vási, men at leiðslan lat ikki við seg koma. Í gjár avhoyrdi Kongressin FBI-agentin Coleen, sum í síðsta mánað sendi FBI-stjóranum, Robert Mueller, eitt langt bræv, har hon fanst hvassliga at arbeiðsháttinum hjá leiðsluni.

Men Bush lovaði í røðu síni amerikanska fólkinum, at hann og stjórnin hava sett sær fyri at rætta skeivleikarnar. Til tess hevur stjórnin samtykt at skipa eina nýggja ráðstovu, sum skal hava ábrygdina av innanlendis trygdini. Fíggjarætlanin hjá ráðstovuni verður umleið 300 milliardir krónur, og forsetin bað Kongressina játta pengarnar seinni í ár.

Tann nýggja ráðstovan skal samskipa arbeiðið hjá fregnartænastuni CIA, samveldisløgregluni FBI, Secret Service, tollvaldinum, innflytaramyndugleikunum og marknaeftirlitinum.

Sambært amerikanskum eygleiðarum er ein ætlan við nýggju ráðstovuni at bøta um viðurskiftini millum CIA og FBI, sum í mong ár hava lagt størri dent á at kappast enn at samstarva.

# Pakistanar bumbaðu bygdir

**Pakistanski herurin nýtti í gjár kanónir ímóti fleiri bygdum í indiska partinum av Kashmir**

KASHMIR-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen*

Indisku myndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at pakistanski herurin hevði skotið við kanónum eftir fleiri bygdum í indiska partinum av Kashmir. Álopið var í landspartinum Poonch. Í hesum sama økinum doyðu 14 fólk í álopum fyri átta døgum síðani.

Eisini í fyrradagin var ófriðarligt í Kashmir. Hesaferð vóru tað indiskir og pakistanskir hermenn, sum brustu saman í tí pakistanska partinum av Kashmir. Trý fólk lógu eftirá, og fleiri hundrað fólk noyddust at taka til rýmingar.

Samstundis halda semingaroyndirnar fram. Amerikanski varauttanríkisráðharrin, Richard Armitage, hevur verið í Pakistan seinastu dagarnar, har hann hevur tosað við Pervez Musharaf, forseta. Forsetin vissaði semingsmannin um, at Pakistan fer ikki at byrja eitt kríggj við India, og við teimum boðum fór Richard Armitage til India í gjár.

Indiska stjórnin hevur boðað frá, at hon fer ikki at samráðast við pakistanar, fyrr enn álopini hjá teimum víðgongdu muslimsku bólkunum í Kashmir fáa ein enda. Muslimsku bólkarnir krevja, at alt Kashmir kemur undir pakistanskt vald, ella at Kashmir verður sjálvsstøðugt.

Pakistanski uttanríkisráðharrin, Abdul Sattar, fór frá hósdagin. Alment varð sagt, at ráðharrin hevði biðið um at sleppa frá av heilsuávum.

Úr Norðurlondum:
## Sjúk av at arbeiða

Í Noregi vísir ein kanning, at umleið 250.000 norðmenn gerast sjúkir av at vera til arbeiðis. Orsøkirnar eru fleiri, men tað eru serliga happing, vánalig arbeiðsviðurskifti og undirmanning, sum elva til sjúkurnar.

Í 2000 fingu heilsumyndugleikarnir fráboðanir um 3.649 tilburðir, har fólk vórðu vorðin sjúk orsakað av arbeiðinum. Harafturat vóru 22.700 fólk, sum vóru vorðin sjúk orsakað av vánaligum arbeiðsumstøðum. 57 fólk doyðu av arbeiðsskaða.

Kanningin sigur, at verða allir arbeiðsskaðar tiknir undir einum, kostaðu teir norska samfelagnum 65 mia. krónur í 2000.

## Ongan stuðul

Roskilde Festivalurin er í fíggjarligum trupulleikum. Leiðslan søkti herfyri Roskilde Kommunu um hjálp, men býráðið sigur seg ikki kunna veita festivalinum stuðul. Borgarstjórin, Bjørn Dahl, sigur, at kommunan vildi fegin hjálpt festivalinum, men tá talan er um eitt privat tiltak, hevur kommunan ikki loyvi at veita fíggjarligan stuðul, sigur hann.

Festivalurin hevði søkt kommununa um tríggjar mió. krónur í stuðuli til neyðug trygdartiltøk, sum myndugleikarnir kravdu eftir vanlukkuna í 2000, sum kravdi níggju mannalív.

Roskilde Festivalurin hevði næstan 10 mió. krónur í halli í fjør.

## Aftur til arbeiðis

Meiri enn 3.000 norsk blaðfólk, sum hava verið í verkfalli hesa vikuna, fóru aftur til arbeiðis í gjár. Úrslitið av trætuni millum blaðfólkini og blaðútgevararnar var, at blaðfólkini fingu fimm vikur frí um árið, og at skipanin kemur í gildi longu í ár. Herumframt fáa blaðfólkini meiri løn.




# Lýsið har lýsingarnar síggjast

## Leys størv í Føroyum & uttanlands

Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.

Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

| | |
|---|---|
| 1 viku | kr. 1.000,- |
| 2 vikur | kr. 1.500,- |
| til freistin er úti | kr. 2.000,- |

Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo







Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820